# **Móttøka fyri dialysueindini á Suðuroyar sjúkrahúsi – 1. mars 2024**

Góðan dagin øll somul.

Takk fyri, at eg eri boðin til móttøkuna her í dag at siga nøkur orð.

Leiðslan fyri Sjúkrahúsverkið, hevur, saman við fakfólki á økinum, staðið á odda fyri at skipa dialysusatelittin her suðuri. Uttan tykkara áhaldandi og stóra arbeiði, vóru vit ikki komin á mál.

Tilgongdin hevur verið drúgv, men nú eru øll viðurskifti komin uppá pláss, soleiðis at borgarar kunnu fáa trygga og góða dialysuviðgerð í Suðuroy.

Eg eri fegin um, at Sjúkrahúsverkið tekur stig til, at hátíðarhalda at dialysuviðgerðin nú kann byrja á Suðuroyar sjúkrahúsi. Tað er umráðandi at steðga á, og feira tær góðu løturnar.

Tað sum eg gleðist allar mest um, er hvussu nógv hetta fer at lætta um hjá tykkum borgarum, sum hava tørv á regluliga dialysuviðgerð í oynni. Hetta hevur ómetaliga stóran týdning fyri tykkum. Tí hevur hetta eisini verið eitt

mál, sum hevur verið raðfest høgt, bæði í okkara samgongu og undanfarnu samgongu.

Onnur fáa eisini gleði av dialysusatelittinum her suðuri. Eg var boðin á aðalfund hjá nýrafelagnum í 2023, har eg fekk høvi at práta við nevndina og limir í felagnum, um hvussu tað er at liva við nýrasjúku í Føroyum. Tá greiddu tey millum annað frá, at tey gleddu seg til eisini kunna ferðast til Suðuroyar, tá møguleiki verður at fáa gesta dialysuviðgerð á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Átti sjálv eina fastur, sum í nógv ár búði í Danmark. Hon gjørdist nýrasjúk – og hon plagdi at fegnast um, at tað bar

til at koma til Føroya at vitja og fáa gestadialysu – tí vit skulu ikki so nógv ár aftur, har hetta ikki var møguligt her heima.

Eg fari at takka øllum, sum hava verið við til at gera tað møguligt fyri Sjúkrahúsverkið, at bjóða dialysuviðgerð her í Suðuroy. Tað eru læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, starvsfólk, politikarar, sjúklingar og avvarðandi, tykkara stuðul og ágrýtni hava borið hetta á mál.

Dialysusatelitturin er ein siður fyri øll, sum hava stríðst fyri hesum. Dialysusatelitturin er ímyndin av, at um viljin er til staðar, og vit standa saman um at loysa avbjóðingarnar, so ber næstan alt til.

Men í dag snýr tað seg ikki um at dvølja við fortíðina. Nú fara vit at hyggja frameftir.

Hesin dialysusatelitturin er ein nýggjur kapittul í okkara søgu. Ein kapittul um vón um betri lívsgóðsku hjá dialysusjúklingunum í Suðuory, og um eitt Sjúkrahúsverk sum er nærri borgaranum.

Eg eri vís í, at hetta fer at eydnast væl. Við dugnaligum starvsfólki, sum leggja alla orku í, at veita eina góða tænastu.

Tað er mín vón at vit øll kunnu gleðast um, at dialysuviðgerðin nú kann byrja á Suðuroyar sjúkrahúsi. Og at hetta fer at gera lívið hjá dialysusjúklingum í Suðuroynni léttari.

Takk fyri øll somul.